# vards 2009

Besti Bólkur gjørdist Páll Finnur Páll. Við teirra provokerandi, fólksligu og fúlu tekstum teljast teir ímillum bestu LIVE bólkarnir í Føroyum, og í gjár varð tað staðfest, at teir eru besti bólkurin í Føroyum.





Ársins Lag átti The Dreams, sum seinastu árini hava tikið stórt fet á altjóða pallinum, og í dag teljast millum best umtóktu tónleikabólkarnir í Føroyum og í Danmark. Teir vóru tíverri ikki til staðar vegna konsertferð, men familja teir tók ímóti virðislønini.

Ársins nýggi bólkur gjørdist Oniontree, sum seinastu vikurnar hevur ligið ovast á 15 teimum bestu við lagnum The machine. Teir hava fyri stuttum givið teirra fyrstu fløgu út, og hava ætlanir, um at útgeva enn eina fløgu í komandi ári.





Ársins Útgávu átti Guðrið Hansdóttir. Fløgan "The Sky is Opening" hevur verið ógvuliga væl umtókt millum føroyingar, og í næstum skal Guðrið til Amerika, har hon skal framføra á størsta festivalinum har.



Ársins Herðaklapp verður á hvørjum ári latið onkrum, sum hevur havt serstakan týdning fyri føroyska tónleikaheimin. Miðlahúsið lat í gjár Ársins Herðaklapp til Frændur, sum seinastu 25 árini hava staðið á odda fyri fólksliga tónleikin.











Umframt virðislønarhandanir vóru eisini nógvar ymiskar framførslur. Analog Norð byrjaði kvøldið við teirra elektro rokk/popp tónum. Síðani trein Marius á pallin. Eisini vóru framførslur frá Brandi Enni og Jógvan Hansen, og Páll Finnur Páll endaðu kvøldið við einum braki, tá ið teir framførdu í góðar tveir tímar.

Jákup Veyhe var eisini á pallinum, við sínum kenda "Meðan vit liggja við Kaj" skemti, og onkrari sketsju, sum var gjørdi til høvið.

Vit frætta meira frá Planet Awards tiltakinum í blaðnum í morgin.